







# BERT TRÍGGIR TÍMAR TIL MÝVATN



Millum størstu náttúruupplivingar ein kann uppliva í Ìslandi, er Mývatn. Ferðamaðurin nær væl og virðiliga at vitja Mývatn, meðan Norröna liggur við bryggju á Seyðisfjørðinum

Ferðafólkini streyma til Mývatn á íslendska norðurlandinum. Náttúrubaðið við Mývatn, sum liggur á norðurlandinum í Ìslandi læt upp í 2004. Longu teir fyrstu tríggjar mánaðarnar høvdu 30.000 fólk vitja náttúrubaðið. Náttúrubaðið við Mývatn gjørdist skjótt eitt hitt kendasta ferðamálið í Ìslandi. Náttúrubaðið við Mývatn fevnir um eitt økið, sum er fýra ferkilometur til støddar. Vatnhitalagið liggur javnt og samt millum 38 og 41 hitastig. Mývatn liggur í einum ógvuliga serstakum náttúruøki, sum er umgyrt av eldgosum. Mývatn hevur síðani víkingatíð verið eitt stað, har fólk hava leitað sær til, fyri at fáa eitt heitt bað og heilsubót. Tá ein hevur fingið sær eitt heitt bað og heilsubót, ber til at vitja kaffistovuna, sum er á staðnum. Hotel Mývatn kann eisini bjóða nógvan góðan mat, eisini íslendskan mat. Tað tekur bert tríggjar tímar at koyra frá Seyðisfirði til Mývatn, og tá Norröna liggur við bryggju í hálvtannað samdøgur, so er góð tíð til at síggja og uppliva alt tað, sum er kring Mývatn. Tað ber eisini til at fara til Egilstaðir at keypa inn, har nógvir góðir handlar eru. Ynskir ein aðrar stórar náttúruupplivingar, so eru heldur ikki so nógvir tímar at koyra til Dettifoss, sum er máttmiklasti fossur í Europa. Frá Dettifossi er heldur ikki langt til kenda náttúruøkið, Àsbyrgi, sum eisini hevur eina heilt serstaka náttúru, sum er verd at síggja.